# Krabbameinsútgreining
# Illgruni um krabba hjá børnum
# Krabbi í heila ella møn

## Sjúkueyðkenni, ið geva illgruna um krabba í heila ella møn hjá børnum

Illgruni um krabba í heila hjá børnum íkemur, tá eitt ella fleiri av niðanfyristandandi sjúkueyðkennum eru tilstaðar:

- Sjúkueyðkenni til hækkað intrakranielt trýst (ICP)
  * Høvuðpína - serliga, um hon er nýtilkomin ella eyðsýnt broytt
  * Kvalma og spýggjan
  * Stasepapil
- Ov stórt ella skjótt veksandi ummál av høvdinum hjá barninum. Evt. ávirkað sinni
- Framstandandi eygu
- Nýtilkomin fokal neurologisk útfall uttan aðra eyðsýnda orsøk
  * Nýtilkomið fokalt epileptiskt herðindi, tí ikki íroknað klassiska Rolands epilepsi
  * Heilt ella partvíst lammilsi av kranienervum, ørmum ella beinum
  * Skeitan, dupultsjón, óvanligar eygnarørslur ella niðursett sjón
  * Ávirkað gongulag og koordinatión, íroknað nýtilkomið ataksi
- Skeivleiki ella tvungin snaran av hálsinum uttan upplagda orsøk
- Ótilætlað vekttap, vakstrartarnan ella ov tíðliga íkomin pubertetsbroytingar

Illgruni um krabba í møn ella rygggeislum vísur seg, við niðanfyristandandi sjúkueyðkennum:

- Pínu í rygginum
- Broytt gongulag og koordinatión
- Deformeraður ryggur
- Fokalt niðursett megi
- Tamarhaldið á vatnláti ella opningi ikki í lagi

## Akutt samband við barnalækna

Grundaður illgruni stendst, tá UL, MR ella CT vísur rúmfyllandi ífyllu í heila ella møn
Akutt telefoniskt samband við vakthavandi barnalækna á LS

## Kanningar hjá kommunulækna

Klinisk kanning av barninum við neurologiskari kanning

## Ávísingin

Ring fyrst til barnalækna um barnið

Útfyll vinarliga ávísingarfrymilin "Pædiatri - Illgruni um krabba í heila ella møn" undir móttakandi eindini "Krabbaútgreining" í Cosmic. Lýs støðuna undir aktuelt - íroknað nær sjúkutekini eru íkomin v.m.
Orða vinarliga ávísingina so neyvt, at tað er lætt hjá serøkinum at visitera og bíleggja viðkomandi kanningar, so útgreiningartilgongdin verður so skynsom sum gjørligt.

Útgáva januar 2026